

# Oljuvinnufelagið skipar fyri føroyskari luttøku á oljumessu í Norra

**Jan Müller**

10.02.2014 - 19:40

Oljan.fo

Aftur í 2014 verður skipað fyri føroyskum landabási á Offshore Northern Seas 2014 (ONS), sum verður hildin annað hvørt ár í Stavanger í Noregi.

ONS 2014 er í døgunum 25. – 28. august. Messan hevur í nøkur ár verið samskipað av fyrst Menningarstovuni, síðan Samvit og hesi seinnu árini av Løgmansskrivstovuni í samstarvi við Oljuvinnufelagið.

Nú hevur Oljuvinnufelagið yvirtikið hesa uppgávu frá Løgmansskrivstovuni, soleiðis at tað er Oljuvinnufelagið einsamælt, sum hesuferð hevur ábyrgdina av samskipanini av føroyska landabásinum á ONS 2014.

Fyritøkur kunnu boða frá luttøku á føroyska landabásinum á ONS 2014 í seinasta lagi 17. mars hjá Esther Dahl, esther@industry.fo, ella hjá Ólavi í Geil á olavur@legutt.com. Tilmelding skal vera skrivlig. Á føroyska landabásinum á ONS luttóku seinast 18 fyritøkur, myndugleikar og feløg á básinum, og væntandi verður luttøkan ikki minni góð hesuferð skrivar Vinnuhúsið á síni heimasíðu.